# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eg vildi ynskt, at Osama bin Laden fekk tann dóm, sum hann hevur uppiborið fyri sínar illgerðir*

*Barrack Obama*

# USA framt krígsbrotsverk

**Fólk, sum hava sitið í varðhaldi hjá amerikanarum í Irak, Afghanistan og Guantanamo, hava verið fyri likamligari og sálarligari pining, og mong hava fingið varandi mein av tí**

USA hevur framt krígsbrotsverk. Tað er niðurstøðan í einari nýggjari frágreiðing, sum felagsskapurin Læknar fyri mannarættindum hevur skrivað, og sum varð almannakunngjørd í gjár.

Frágreiðingin er grundað á tað, sum læknar hjá felagsskapinum hava skrivað eftir at hava kannað fólk, sum hava sitið í Abu Ghraib-fongslinum í Irak, fangaleguni í Guantanamo í Kuba og í amerikonskum fangalegum í Afghanistan.

Frágreiðingin, sum sambært Læknum fyri mannarættindum er tann fyrsta av sínum slagi, lýsir millum annað, hvussu fangar blivu slignir og bukaðir, píndir við elektriskum stoyti, niðraðáir kynsliga og illa viðfarnir á annan hátt.

- Vit funnu greið prógv fyri likamligari og sálarligari pining, sum ofta alvdu til varandi mein, sigur Allen Keller við CNN. Hann var ein av læknunum, sum kannaðu fangarnar.

Heryvirmaðurin Antonio Tabuga, sum stóð fyri kanningunum aftan á tær ræðandi myndirnar úr Abu Gharib-fongslinum, hevur skrivað inngangin til ta nýggju frágreiðingina.

- Tað er eingin ivi um, at verandi stjórn framdi krígsbrotsverk. Tann einasti spurningurin er, um teir, sum góvu boð um at pína fangar, verða revsaðir, skrivar general-



*Myndirnar úr Abu Ghraib-fongslinum avdúkaðu, at amerikanarar fóru illa við fangum í Irak*
*Mynd: Polfoto*

# Trý tikin fyri Politkovskajamorðið

**Russiska ákæruvaldið hevur ákært trý fólk í sambandi við morðið á tíðindakvinnuna Onnu Politkovskaja, men drápsmaðurin er ikki funnin enn**

Russiska løgreglan sigur nú, at hon er í ferð við at leggja seinastu hond á kanningarnar, sum vóru settar í verk, tá tíðindakvinnan Anna Politkovskaja varð funnin myrd uttan fyri íbúð sína í Moksva tann 7. oktobur í 2006.

Sagt verður, at ákæruvaldið hevur skuldsett trý fólk í sambandi við morðið, men ákæruvaldið viðgongur, at drápsmaðurin sjálvur er ikki tikin enn. Umframt tey trý skuldsettu er ein fyrrverandi embætismaður í teimum loyniligu tænastunum skuldsettur fyri at hava misbrúkt sítt embæti í sambandi við drápsmálið.

Anna Politkovskaja var kend fyri sínar atfinningarsomu blaðgreinar um eitt nú kríggið í Kekenia, og tann vanliga uppfatanin er, at morðið hevði samband við hennara arbeiði.



*Anna Politkovskaja varð skotin í Moskva í oktobur í 2006*
*Mynd: Polfoto*



# Ráðharri leggur frá sær

Norski olju- og orkumálaráðharrin Aslaug Haga kunngjørdi í morgun, at hon leggur frá sær sum ráðharri og sum formaður í Miðflokkinum. Aslaug Haga hevur verið sjúkrameldað í seinastuni, og á tíðindafundi í morgun segði hon, at hon hevur valt at gevast av heilsuávum. Fleiri halda kortini, at hon tók avgerðina, eftir at fleiri fjølmiðlar hava skrivað, at hon hevur kropið sær uttan um galdandi byggireglur.

## STUTT SAGT

### Kreppa í Argentina

Í Argentina eru stórbøndurnir í øðini, tí politikararnir hava lagt eyka avgjald á soya, sum verður útflutt. Tær seinastu vikurnar hava stórbøndurnir skipað fyri fleiri mótmælum. Eitt nú hava teir stongt fleiri týðandi vegir, so ymsar vørur eru farnar at ganga undan nógvastaðni, og tað hóttir við at koyra landið út í eina kreppu, skrivar AP úr Buenos Aires. Cristina Fernandez, forseti, sigur, at tað nýggja avgjaldið er ætlað teimum argentinsku smábøndrunum, so teir kunnu standa seg betur í kappingini við stórbøndurnar.

Argentina útflytir nógvar matvørur, og landið hevur fingið stóran ágóða av teimum høgu matvøruprísinum á heimsmarknaðinum.

### Thatcher kvettmaður

Ein bretskur leiguhermaður vil vera við, at Mark Thatcher, sum er sonur fyrrverandi bretska forsætisráðharran Margareth Thatcher, var uppi í ætlanum um eitt statskvett í Ekvator-Guinea í 2004. Leiguhermaðurin, Simon Mann, varð tikin í Zimbabwe saman við øðrum leiguhermonnum í mars í 2004, og bretska fregnartænastan hevur upplýst, at leiguhermenninir høvdu eina fullfíggjaða kvettætlan í viðførinum. Simon Mann varð í fjør sendur til Ekvator-Guionea, har hann er skuldsettur fyri at hava havt ætlanir um kvettroynd. Myndugleikarnir har umhugsa nú at krevja Mark Thatcher útflýggjaðan.



*Mark Thatcher*
*Mynd: Reuters*